# Bárður Nielsen spælir høgt spæl

**Men hann skal ikki trúgva at hann fær so lætt spæl, sum hann heldur, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í landsins størsta fakfelag.**

Sáttmálasamráðingar

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Bárður Nielsen spælir høgt spæl. Men eg kann forvissa hann um, at hann skal ikki sleppa so lætt, sum hann heldur.

Gunnleivur Dalsgarð er formaður Starvsmannafelagnum, sum er landsinsstørsta fakfelag, og hann er í øðini inn Bárð Nielsen, eftir at hann vrakaði semjuna, sum SEV og Maskinmeistarafelagið gjørdu seint leygarkvøldið.

– Eg fái meg ikki at trúgva, at Bárður Nielsen hevur politiska undirtøku fyri hesum í landsstýrinum.

– Men eg fari undir øllum umstøðum at ávara Bárð Nielsen og alt landsstýrið ímóti halda fram í hesum sporinum, sum tað nú er lagt upp til.

– Eg kann vissa bæði Bárð Nielsen og alt landsstýrið um, at tað skal ikki verða so lætt, sum teir halda.

*– Hetta er eitt ótrúliga grovt álop, men Bárður Nielsen skal ikki vera so bláoygdur, at hann heldur, tað tað skal vera so lætt, sum hann heldur, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

### Aldrin verið meiningin

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað, sum er hent í hesum málinum, er, at Bárður Nielsen hevur kolldømt eitt úrslit, sum tveir partar á arbeiðsmarknaðinum hava rokkið í semingi.

– Tá ið landsstýrismaðurin skal góðkenna sáttmálan, kann tað aldrin hava verið meingin, at hann skal góðtaka lønarásetingina. Tað einasta, hann skal syrgja fyri, er, at sáttmálin harmoniserar við aðrar sáttmálar og annars lýkur lógarinnar krøv.

– Við at leggja seg út í lønarhækkingina, hevur landsstýrismaðurin í veruleikanum tikið samráðingarrættin frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og tað kann fakfelagsrørslan í Føroyum ikki standa modell til.

Bárður Nielsen sigur, at hann kann ikki góðkenna SEV-sáttmálan tí hann gevur ov stóra lønarhækking og hann stúrir fyri, at hesin sáttmálin fer at verða brúktur sum fyrimynd í almennu lønarsamráðingunum, sum verða seinni í heyst og tað hevur landið ikki ráð til, heldur hann.

– Eg kann vissa Bárð Nielsen um, at vit seta okkara krøv fram uttan mun til, hvat stendur í øðrum sáttmálum.

– Semjur, sum onnur hava gjørt, fær onga sum helst ávirkan á okkara krøv. Vit farta at seta okkara krøv eftir, hvat vit halda er tann rætta lønin hjá limum okkara eftir teirri gongd, sum er í samfelagnum. Tað er so einfalt, sum tað fær verið.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at tað, sum nú er farið fram, er ikki annað enn ein víðariføring av tí, sum hendi, táið privati arbeiðsmarknaðurin gjørdi sín sáttmála fyrst í mai.

– Tá sendu arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarafløgini eina felags yvirlýsing, har tey staðfestu, at almenni arbeiðsmarknaðurin ikki skuldi hava hægri lønarhækking.

– Tað sum so hendur nú váttar bara mín illgruna um, at Bárður Nielsen hevði fingurin við í teimum samráðingunum, meiri enn gott er.

### Skal ikki fáa tað so lætt

Men Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hetta er at taka samráðingarrættin frá fakfeløgunum og tað fara tey ikki at góðtaka.

– Hetta er ómetaliga provokerandi og eg kann vissa landsstýrismannin um, at hann skal ikki fáa tað so lætt, sum hann kanska heldur, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

–Tað, sum Bàrður Nielsen sigur, er, at hann góðtekur onga lønarhækking. Sostatt hevur hann longu gjørt, at vit skulu onga lønarhækking hava, sum arbeiða hja tí almenna. Hetta er at taka samráðingarrættin frá okkum og tað er eitt ótrúliga grovt álop á alla fakfeløagsrørsluna og tað skal ikki vera so lætt, sigur hann.

# Tunlarnir skulu passa inn í eina lands-samferðsluætlan

*Ein spurningur, sum skal viðgerast ógvuliga gjølliga, er, um tað er forsvarligt at gera Eysturoyarunnilin og Sandoyartunnilin ísenn, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður*

**– Landið skal onki hava við undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørðin og Havnina at gera og tunnilin í Sandoy verður gjørdur, tá ið landið hevur ráð**

Undirsjóvartunlar

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Undirsjóvartunnilin í Sandoynna og undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørð og Havnina skulu passa inn í samferðsluætlanina hjá landsstýrinum.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum og virkandi løgmaður.

Hann vísir á, at Skálafjarðartunnilin er privatur burturav og hann skal landið onki hava við at gera.

Hann staðfestir somuleiðis, at tað kemur heldur ikki uppá tal, at landið fer at veðhalda fyri fíggingina í sambandi við tann tunnilin. Hinvegin staðfestir hann eisini, at tunnilin í Sandoynna er so mikið dýrur, at hann verður ikki fíggjaður við bummpengum burturav. Í løtuni er støðan tann, at tey, sum hava tikið stig til Eysturoyartunnilin, hava boðað landsstýrinum frá, at tað verður klárt at fara undir arbeiðið um innanfyri eitt heilt stutt áramál.

– Einasti leiklutur hjá landinum í hesum sambandi verður at geva loyvi til at fara undir arbeiðið.

### Veldst um politiska viljan

Bjarni Djurholm sigur, at í sambandi við Sandoyartunnilin er peningur settur av til tær fyrstu kanningarnar í ár og hetta verður í hvussu so er næsti undirsjóvartunnilin, sum landið fer undir.

Spurningurin er so um samgongan er sinnað at seta meiri pening av til framhaldandi kanningar næsta ár, ella í 2007.

– Vit hava sum mál at fáa kanningararbeiðið í sambandi við Sandoyartunnilin liðugt í hesum valskeiðnum, so at tað verður klárt at taka politiska støðu til um farast skal undir tunnilin, ella ikki, og, nær farast skal undir hann.

– Tað veldst alt um, hvussu nógv tað ber til at seta av til framhaldandi kanningar á fíggjarlógunum fyri 2006 og 2007. Og um vit fara undir hann, og nær, veldst alt um, hvussu ráðini hjá landskassanum verða. Hava vit ráð til tað, verður hann gjørdur. Hava vit ikki, verður hann gjørdur seinni.

– Sanfoyartunnilin er so dýrur, at tað er í øllum førum eitt mál, sum skal lýsast ómetaliga væl, sigur Bjarni Djurholm.

Men landsstýrismaðurin leggur afturat, at báðir tunlarnir skulu passa inn í samferðsluætlanina, sum vinnumálararáðið er í ferð við og sum verður liðug næsta ár.

– Ber tað yvirhøvur til at fara undir tvær so stórar verkætlanir ísenn, hóast onnur er privat og hin almenn?

– Tað er ein góður spurningur. Í øllum førum verður tað neyðugt at bera so í bandi at ikki báðar verkætlanirnar verða so mikið samanfallandi, at tær koma at drena samfelagið fyri arbeiðsmegi og serfrøði í so stóran mun, at tað førir til at samfelagsbúskapurin gerst ov heitur. Tað er sjálvsagt ein spurningur, sum skal viðgerast ógvuliga gjølliga, sigur Bjarni Djurholm.

